sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritøkustjóri: Kristjan Dahl
Lýsingarstjóri: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Justinus Eidesgaard - Sigurður Skaale - Eyðun Klakkstein

Útgevari, uppseting og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26, Argjum

Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon 11820
Telefax 14720

Týðandi fundir og avgerðir í desember

Oddagrein

Í desember mánað koma fleiri týðandi avgerðir at verða tiknar, sum viðvíkja Føroya framtíð upp á stytri og longri sikt. Ein er uppskotið til komandi løgtingsfíggjarlóg. Her er rætt liga avgerandi, at "friður" fæst aftur í samgonguflokkunum, soleiðis at hesir eru førir at virka sum eina samd samgonga. Her verður so mikið hugsað um hendingina í sambandsflokkinum, har ein tinglimur hevur tikið seg úr flokkinum og so støðuna í fylkingini, har tað í skrivandi løtu enn er óvissa um nýggja landsstýrismannin. Uppi í fíggjarlógini hanga so fleiri stórir spurningar so sum skattalættin, fiskivinnupolitikkurin osfr. Stór mál, sum vit enn ikki vita við vissu verða loyst. Sum so er komandi fíggjarlógar uppskotið eisini ein stór avbjóðing til alla tá politisku skipanina, tí hon er tann fyrsta í fleiri ár, har vit ikki eru í donskum "hafti" men har vit sjálvi kunnu gera av, hvat skal á fíggjarlógina. Hon er sum so ein stór avbjóðing til okkara politikarar, tí nú standa teir einsamallir við ábyrgdini og avgerðini, hvat skal henda komandi ár og árini.

EIN onnur týdningarmikil hending í desember mánað er fundurin í London um markið. Hesin fundurin sigst at skula vera eitt vegamót í samráðingunum og vit mugu so bara vóna, at eitt "úrslit" fer at verða til okkara besta. Ein skilagóð loysn á hesum øki kann hava ómetaliga stóran týdning fyri komandi ættarlið. Tí tað snýr seg um ognarrættin til eitt møguligt ríkidømi í undirgrundini. Er tað so, at bretar framhaldandi seta fyri okkum órímulig krøv, so er einki annað at gera enn at lata tíðina tvs. møguliga ein dóm í Haag gera av, hvussu markið skal ásetast. Men tað kann eisini merkja, at tað verður hildið fram við sam-ráðingunum í óvissa tíð, møguliga við politiskari uppilegging. At vit ta møguliga ikki sleppa at bjóða út tey í løtuni mest áhugaverdu økini til oljufeløgini sum ætlað um eitt ár mugu vit so liva við. Vit mugu so ikki slaka og gera eina semju bara tí at vit skulu sleppa at bjóða út nøkur av teimum umstriddu økjunum, sum vit í dag halda eru okkara. Spurningurin um eitt joint-venture samarbeiði í hesum økjum, meðan londini halda fram við samráðingunum, hevur verið frammi og kundi tað verið áhugavert at vita, um hetta kann blíva ein partur av eini fyribils"loysn".

EITT annað mál, sum avgerð helst eisini skal takast um í desember er spurningurin um eina nýggju boring í Lopra. Hetta málið er helst nógv meira áhugavert og týdningmikið enn flestu av okkum gera sær greitt í løtuni. Tí við eini slíkari boring kunnu fáast upplýsingar, sum kunnu fáa koveltandi týdning fyri alla gongdina í olju og undirgrundarmálinum sum heild. Umleið 1. desember skulu oljufeløgini, sum vórðu boðin til Føroya her fyri at fáa innlit í projektið, siga frá, um tey eru hugað at verða við til at fíggja eina boring í Lopra í næsta ár. Eftir tí sum vit hava skilt á fleiri av feløg unum, so eru tey hugað at vera við. Tey liggja í "bíðiposition" og vilja vita, um hini eisini vera við. Ein boring kann eisini fáa stóran týdning fyri virksemi landi, tí hon vil ta vera ein tann fyrsta veru-liga avbjóðingin hvat viðvíkur at veita tænastur og arbeiðsorku. Spurningurin er um vit eru tilreiðar til tess. Tíðin er komin, at vit evaluera hetta fyrsta kapitlið í okkara olju og undirgrundarsøgu og spyrja, um og hvat skal gerast øðrvísi enn ætlað.

Sosialurin

Síðu 2 viðmerkingin

Ein skattalætti sum munar

Havnar Kommuna hevur nú gjørt sítt fyri at lætta um fíggjarliga hjá fólki. Nú eigur landið at lata sín part, so vit fáa ein skattalætta, sum veruliga munar, skrivar Torfinn Smith, býráðslimur

Í seinastu viku gjørdi Tórshavnar Býráð av at lækka kommunuskattin við einum prosenti. Harafturat at hækka barnafrádráttin úr 2800 upp í 3000 krónur, at taka av gjaldið á ruskposum og at seta í verk tangatømingarskipan, fíggjaða yvir kommunukassan.

Hvørt í sínum lagi smávegis bátar, men tilsamans ikki heilt einki.

Afturat hesum samtykti býráðið at gera íløgur fyri 14 milliónir, umframt at hækka kontoina fyri ástaltarbeiði munandi. Somuleiðis fer Tórshavnar Havn at gera íløgur komandi ár fyri slakar átta milliónir.

Hetta økta virksemið skuldi givið nakað av arbeiði. Pengar koma í umfar og gevur vónandi, saman við beinleiðis fíggjarliga lættanum, fólki eina bóming av hart tiltrongdari optimismu.

Fleiri krónur at ráða yvir

Lat okkum taka sum dømi eitt miðal húsarhald: hjún við tveimum børnum. Annar hjúnafelagin er í almennum arbeiði og hin í privatum. Inntøkurnar ávikavist 200.000 og 150.000 krónur. Skattalættin merkir slakar 300 krónur um mánaðin. Barnafrádrátturin og posagjaldið geva ein mánaðarligan lætta uppá uml. 100 krónur. Tvs. umleið 400 krónur. Alment lønt fáa eina lønarhækking nú 1. januar, sum eftir skatt merkir umleið 150 krónur. Sostatt skuldi hetta húsarhaldið næsta ár havt umleið 550 krónur fleiri tøkar enn í dag.

Landið má eisini lata sín part

Ilt er at siga, hvussu verður við skattalættanum, sum nakrir landsstýrismenn hava sagt seg vilja lata.

Fíggjarmálaráðharrin hevði alla orsøk at ilskast inn á SEV, tá eftirlagsskapurin kom við sínum »lætta«. Tó vildi Jóannes Eidesgaard vera við, at so leingi - í hesum førinum SEV - ikki hevði frægari vilja at lætta um, so dugdi hann ikki at síggja, at landið hevði nakra orsøk at koma við sínari hjálp.

Men nú hevur Havnar Kommuna spælt út, og tí hava vit ikki annað at rokna við, enn at landsstýrismaðurin nú vísir sín góða vilja í verki og letur sín part til ein skattalætta, sum vónandi tá kann sigast at vera ein lætti, sum veruliga munar. Og hesin lættin skal koma 1. januar.

Torfinn Smith

Amnesty International

Upplatingartíðirnar hjá Amnesty International, Føroya Deild eru: Týsdag, hósdag og fríggjadag frá kl. 13 til kl. 17. Tlf. 15816.

Tíðindaskriv frá Føroya Landsstýri og telefonverksstjóranum

Eftir uppskoti frá Sólbjørn Jacobsen, telefonverksstjóra, er seinnapartin í dag gjørd avtala millum landsstýrið og telefonverksstjóran, har Sólbjørn Jacobsen fær farloyvi úr stjórastarvinum á telefonverkinum í tíðarskeiðinum 1. desember 1995 til 30. november 1997.

Í hesum tíðarskeiði skal hann í samskifti við og undir leiðslu av tí sama tíðarskeiði setta stjóra fyri telefonverkið taka lut í arbeiðinum við at lýsa og fastleggja framtíðarstrategi telefonverksins, herundir neyðugar lógarbroytingar, møguligar bygnaðarbroytingar o.a.

Føroya Landsstýri hevur avgjørt, at í sambandi við at verandi telefonverksstjóri hevur fingið farloyvi, verður Andrass Róin settur sum stjóri á telefonverkinum við uppgávum og heimildum sambært galdandi reglugerð fyri TF. Umframt at standa fyri leiðslu telefonverksins verða høvuðsuppgávur nýggja stjórans at fyrireika og umskipa telefonverkið til tær broytingar, ið eru í ferð við at henda og væntandi fara at henda í komandi árum á tøkniliga og samfelagsliga økinum innanlands og í samskifti við umheimin.

Andrass Róin er 33 ár og úr Havn. Hann er cand. scient. pol. frá Århus Universitet 1988. Síðani 1990 hevur hann starvast fyri donsku telefyritøkuna Jydsk Telefon, har hansara høvuðsuppgávur hava verið strategi og planlegging innan telesamskifti í altjóða samanhangi.

Tinganes, 24. november 1995

TINGANES

SÓLBJØRN JACOBSEN
TELEFONVERK FØROYA LØGTINGS

Framtaksgrunnurin
Yviri við Strond 2
Postsmoga 3157
110 Tórshavn
Telefon 15966
Telefax 19139

VALUTAKURSIR

		28.11.95	Ultimo síðsta mán.
USA	Dollari	557,60	547,60
Bretland	Pund	865,06	863,55
Týskland	Markur	387,38	388,14
Svøriki	Króna	85,15	82,39
Noreg	Króna	88,09	87,79
Frakland	Frankur	112,87	111,85
Belgia	Frankur	18,862	18,887
Sveits	Frankur	481,20	480,44
Holland	Gyllin	345,91	346,21
Italia	Liri	0,3493	0,3434
Finnland	Markur	130,59	128,81
Ísland	Króna	9,51	9,47
Eysturríki	Skillingur	55,091	55,192
Spania	Pesetas	4,560	4,484
Portugal	Escudos	3,722	3,688
Kanada	Dollari	411,54	409,72
Grikkaland	Drakmur	2,393	2,386
Japan	Yen	5,5047	5,3732
Írland	Pund	893,73	886,03
	XEU	718,41	712,58

Kelda: Føroya Sparikassi